**DVD FILMAR TIL SØLU**
Høj Pistolføring, Falling Down, Sleepy Hollow, Lethal Weapon 4, Star Trek 3, Being John Malkovich, Intet nyt fra vestfronten, Ali, Boyz in the Hood, Bowfinger, Enemy of the State, American Psycho. Kr. 99-149 pr. stk.
*Tlf. 510441*

**TIL SØLU**
PlayStation 2 spøl: 'Tomb Raider: Angel of Darkness', 'Max Payne 1', 'Max Payne 2', 'James Bond: Everything or Nothing', 'Spiderman'. 200 kr. fyri hvørt.
*Ring ella send sms til 580262*

**7 X SPØL TIL SØLU**
Lord of the Rings nr. 1, Enter the matrix, Prins of persia, The sands of time, Rovgue ops fyri 300,- kr. stk. Grand theft auto nr. 3, Vice city fyri 50,- kr. stk. Metal Gear solid nr. 2 fyri 350,- kr.
*Tlf. 318808*

**TIL SØLU**
Epson stylus color 580 printari, lítið brúktur, o.u. 4 ára gamal, selist fyri kr. 500,-
*Tlf. 361004*

**TELDA TIL SØLU**
AMD-Athon XP 2400+ 512 DDR-Ram, G-Force FX 5600 video in/out DDR 256 Sub +2 hátalarar, netkort, 30 GB Harddisk, 17" skerm + spøl o.a.
*Tlf. 582525*

**TIL SØLU**
Playstation II, joypads, memory kort. 8 spøl m.a. Final Fantasy X og X-2, Tekken 4 og Gran Turismo 3.
*Tlf. 227695*

**HEVUR NAKAR**
ein Playstation 2 (møguliga við spølum) til drong 7 ár, at selja okkum?
*Ringið 514462*

## Tónleikur

**EITT ROLAND RD 600**
El-klaver til sølu. Klaverið hevur 88 vektaðar tangentar. Er í sera góðum standi. Nýprísur 17.000 kr. Fer fyri hálvan prís. Ring
*Tlf. 585555*

**MUSIK (GREIN)**
Eg eigi fløgur og LP, danskar og útlendskar. Eg leiti eftir føroyskum fløgum. Hvat vil tú hava aftur?
*Tlf. +45 86448627 ella +45 26747474*

**TRUMMUSTATIV YNSKIST**
Bíliga til keyps. Spyr eftir Jákup
*TYlf. 441631*

**GUITARFORSTERKARI OG PEDAL**
Hohner professional el-guitari v/ tasku, Hohner Reverb 25 forsterkari og 200m 606 multi FX pedal. Til sølu hvørt sær ella samlað.
*Tlf. 226159 eftir kl. 16*

**TIL SØLU**
Kawai-orgul v/ bonki til sølu fyri 1.000,-
*Tlf. 448878*

**SURROUND ANLEGG**
til heimabiograf. Forsterkari, 4 hátalarar, 1 subwoofari og ein dvd maskina bíliga til sølu vegna flyting til DK.
*Tlf. 261595 eftir kl. 18*

**HIGH-END ANLEGG**
Hondgjørt í Danmark. Lesið meira á www.Holfi.dk, ella á www.hifiklubben.dk Tilboð gevst. fo_hifi@hotmail.com
*Tlf. 0045 86602494*

**BASSGUITARI YNSKIST**
Ein bassguitari við forsterkara, ynskist bíliga til keyps.
*Tlf. 319741*

**TRUMMUSETT**
av slagnum Tama til sølu fyri 9000 kr. ella hægsta boð yvir. Sær væl út og í sera góðum standi.
*Tlf. 447547/266252*

**FENDER STRATOCASTER**
til sølu, lítið og einki brúktur, bert eitt ára gomul.
*Tlf. 258642*

**TIL SALG**
Højtalere Jamo D870 Concert 11 High End 3 vejs Basrefleks gulvhøjtaler 150W/200W long/short Frekvens 30-22000, vægt 32,5 kg. stk. Som nye. Pris ialt: 13.000 kr.
*Tlf. 271827*

## Ymiskt

**LOPPUMARKNAÐUR**
Reyði Krossur Føroya hevur loppumarknað leygardagin 30. oktober frá kl. 10.00-14.30. Vit vóna at síggja nógv fólk í Vágsbotni nr. 9.
*Reyði Krossur Føroya*

**FARTELEFON TIL SØLU**
Fartelefon, Siemens C60 við litskermi, Triple Band og polyphoniskar ringitónar. Prísur 900,-
*Tlf. 421721*

**PERSIENNIR TIL SØLU**
Træ persiennur, kirsuber, til sølu 2 stk L x B: 210 x 120 cm. 350,- stk 1 stk L X B: 110 x 113 cm. 150,- stk.
*Tlf. 332982 ella 266070*

**SMS CHATBOARD**
Óbrúkt til Nokia 51xx og 61xx modellini. Góð til m.a. SMS, telefonbók v.m. til sølu fyri 150 kr.
*Tlf. +45 86448627 ella +45 26747474*

**BATTRÍ TIL NOKIA TELEFON**
Til sølu fyri 50 kr.
*Tlf. +45 86448627 ella +45 26747474*

**TIL SØLU**
Vektbonkur, Ketler Classic, + 3 stengur og 50 kg í vektum, kr. 4.500. Rygg- og búk venjingarbonkur 500 kr.
*Tlf. 322271*

**MÁLNINGUR**
Oljumálningur eftir William Smith til sølu. Prísur: 15.000,-
*Tlf. 311996/256494*

**MANNFÓLK - HYGG HER**
Søkt verður eftir 4 flogbóltspælarum: Krøv: mannfólk, millum 35 og 60 ár, seriøsur, hevur temperament, ert ágrýtin, ikki spælt í hægri deild, hevur hug til hugna og skemt. Spælt verður hóskvøld frá kl. 20–22 á Argjum í vetrarhálvuni. Áhugað kunnu ringja til
*Jens á tel. 216222*

**PINKUBARNASVIMJING**
Teknið tykkum til pinkubarnasvimjing í hølum Havnar Svimjifelags, týskvøldið 26. okt. kl. 18–19. Undirvísingin byrjar fríggjadagin 29. okt.
Børn 3–7 mðr. kl. 16.15.
Børn 6–12 mðr. kl. 16.45.
Børn 6–12 mðr. kl. 17.15.
Kostnaðurin 475 kr., kann gjaldast tá teknað verður, ella í seinasta lagi 28. okt. á konto nr. 1015940 í Suðuroyar Sparikassa.
*Havnar Svimjifelag*

**SAMSUNG E700**
Fartelefon til sølu hevur litskerm, myndatól o.m.a. Er nýumvald + fulla servicu sum nýggj kr. 2800,-
*ring ella sms til tlf. 218782*

**TIL SØLU**
Um nóg høgt boð fæst er ein málningur av Sigmund Petersen frá 1966 til sølu. Málningurin er av Kunoyar bygd.
*Tlf. 312798 ella 509410*

**LOPPUMARKNAÐUR**
verður í KFUM leygardagin 6. november frá kl. 10-17. Vit taka tí fegin ímóti øllum lutum og klæðum leygardagin 30. okt. frá kl. 14-19 í KFUM ella ringja á tlf. 264116.
*2.a í Hoydølum*

**JÓASØKAN Í EYDNUNI**
Verður 14. nov. Tilmelding á
*Tlf. 422234*

**NEYSTAGRUND**
niðri á Mørk í Vestmanna til sølu um nóg høgt boð fæst.
*Tlf. 424380*

**GRUNDSTYKKI TIL SØLU**
Eitt 1000 fermetrar stórt grundstykki á Selatrað til sølu.
*Tlf. 449152/212710*

**HEY HEY**
Nú verður tað so, hvat verður, jú tað verður eydnuhjól í Støkkhøllini í Saltangará sunnudagin 31. okt. fyri eldrafelagið Nón. Tey, ið vilja stuðla við at lata lutir til eydnuhjólið kunnu ringja til Poulu tlf. 407073, Amy 447718 ella Mia tlf. 447242. Takk fyri stuðulin.
*Eldrafelagið Nón, Saltangará*

**VENJINGARBONKUR**
Venjingarbonkur til sølu. Vektir fylgja við. Ring og hoyr nærri.
*Tlf.448323 el. 449185*

**OLYMPUS C-770**
Nyt, ubrugt Olympus C-770 ULTRA ZOOM Digital Camera. 4.0 millioner pixel. 10x optisk zoom med ED MPEG4 filmoptagelse med 30 billeder pr. sekund med lyd, i fuld størrelse (640 x 480 pixel). 2 års garanti. Til salg for kun 3,950.- kr Nypris i DK 5.700,- kr.
*Tlf. 32861312/Mobil 26394786*

**TANN ÁRLIGI BASARURIN**
verður 6.11.04. Tey, sum vilja stuðla við lutum kunnu lata teir til onkran í nevndini.
*Sumbiar Ítróttarfelag*

**HAGAPARTURIN**
»Skarðdalur« í Kunoy verður hervið boðin út til haruskjóting, áhugað kunnu ringja innan 1. nov. kl. 22, á tlf.
*456807 ella 282217*

**TIL SØLU**
Vevur til sølu.
*Tlf. 213376/447071*

**FARTELEFON TIL SØLU**
1 mðr. gomul fartelefon av slagnum Siemens M65 til sølu um hóskandi boð fæst. Telefonin hevur hágóðsku myndatól við zoom, hon er sterk, regn og dust tøtt.
*Bergur Johannesen 506962/315741*

**TIL SØLU**
Ein tráðleys telefon – Doro – til sølu fyri 200 kr.
*Tlf. 255279*

**SOLARIUM TIL SØLU**
við 12 rørum á stativi til sølu fyri 1400,- kr.
*Tlf. 421721*

**MODELFLOGFAR!**
Eitt PC9 Semiscale flogfar við 7,5 ccm motori til sølu fyri 2.000 kr.
*Tlf. 224096 eftir kl. 15.30*

**FERÐASEÐIL**
Føroyar Danmark T/R til sølu fyri 2.000 kr. Skal nýtast innan 31. okt. 2004. Ring
*Tlf. 213589 ella 313588 aftaná kl. 18.00*

**HERREUR CASIO C-801**
Ældre model, digital med bl.a. lommeregner, dato, stopur etc. Pris 200 kr.
*Tlf. 271827*

i Sosialurin

# Barnabati gevur jólakalendara út

TÍÐINDASKRIV

Jólakalendarin hesaferð er teknaður av Bent Erdland. Jólakalendarin lýsir sera heppi virksemið hjá Barnabata í Føroyum og øðrum Red Barnet felagsskapum í Norðanlondum og vísir somuleiðis á onnur lond, har slíkir felagsskapir virka ella útinna arbeiði sítt.

Jólakalendarin fæst í øllum Shellstøðum kring landið, er talmerktur og er samstundis ein lutaseðil. Høvuðsvinningurin er ein páskatúrur 2005 við Smyril Line í 1 viku í Danland fyri 2 vaksin og 2 børn við bili aftur og fram.

Kostnaðurin er 40 kr. eintakið, og fer peningurin óskerdur til arbeiðið hjá Barnabata.

Endamálið hjá Barnabata er at betra um korini hjá børnum í Føroyum og og øðrum londum, har korini ofta eru sera ring hjá hesum bólki. Hetta verður gjørt í samstarvi við aðrar líknandi stovnar, sum allir arbeiða við atliti til sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi barnanna. Sáttmálin er enn ikki ein partur av føroyskari løggávu, men Løgtingið samtykti fyri meira enn tíggju árum síðani tvs. 9. apríl 1992 at hesin sáttmáli skuldi vera galdandi fyri Føroyar. Føroyar hava við staðfestingini átikið sær at tryggja, at rættarstøða barnanna - í løggávu og fyristingarligari siðvenju - eru í samljóð við endamálið við sáttmálanum.

Barnabati varð stovnað 22. mars 1980, t.e. árið eftir altjóðað barnaárið 1979. Tá vóru fleiri lokalfeløg runt um í landinum við ymiskum aktivitetum, men sum fráleið minkaði aktiviteturin, tí hesin var so bundin av ávísum persónum. Tí eg tað bert Landsfelagið í Havn, sum enn er virkið, og ætlandin er komandi ár at verða meira sjónlig aftur.

Barnabati hevur umboð í Føroya einkjugrunni, í stýrinum hjá Føroya Barnaheimi og í húsaráðnum fyri Margarinfabrikkina í Havn.

Nevndin er soleiðis skipað í løtuni: Hensia Einarsson, formaður, Súsanna í Stórhúsi, kassameistar, Jákup Mørkøre, skrivari, Peturbjørg Jensen, nevndarlimur, Elna Strøm, nevndarlimur.

# Ársveitsla hjá Føroya Ellisakførum

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Ellisakfør*

Komandi leygarkvøld 30. oktober verður ársveitslan hjá Føroya Ellisakførum í Grønlendingahúsinum í Havn. Ársveitslan er fyri limir við maka ella gesti.

Føroya Ellisakfør er áhugafelagið hjá teimum, ið hava áhuga fyri gomlum bilum og motorsúkklum. Um 170 limir eru í Føroya Ellisakførum.

Felagið hevur til húsa yvir við Strond 22 í Havn, og hýsir ellisakførum í gamla vatnbrunninum undir Gráasteini, ið er innrættaður til endamálið. Við tíðini er ætlanin at gera eitt tekniskt fornminnissavn í brunninum, og verður fyrsta framsýningin í hesum sambandi á ólavsøku komandi ár.

Á ársveitsluni verður ræst kjøt og súpan til matna.

Løgtingsmaðurin John Johannessen fer at skipa fyri undirhaldinum, og til dansin spæla Hjalti Skaale & Co

Nevndin í Føroya Ellisakførum vónar, at so nógv fólk sum gjørligt verða við til veitsluna, har til ber at fáa sær eitt hugnaligt ellisprát, og har vit annars kunnu hugna okkum saman. Veitslan verður leygarkvøldið kl 19.

Teir limir, ið enn ikki hava tekna seg, kunnu gera tað við at venda sær til ein av nevndarlimunum.

TING-HELLAN

*Framhald av síðu 20*

International Maritime Organization (IMO) - ið er ein felagsskapur undir ST - staðfestir óbeinleiðis at føroyingar eru tjóð, ið hevur rætt til sjálvstøðuga umboðan - eitt nú í altjóða ST-felagsskapum. Tá umræður sjálvstøðuga umboðan í altjóða høpi er sostatt ikki talan um nakra forðing frá altjóða síðu.

Somuleiðis er ongin ivi um, at kann heimild gevast fyri, at Føroyar og Grønland kunnu umboða "Ríkið" í altjóða høpi, so kann danska stjórnin sanniliga eisini finna heimild, ið tryggjar at Føroyar og Grønland umboða seg sjálvi í altjóða høpi - ikki minst grundað á altjóða rætt. Talan er í størri mun um manglandi vilja - heldur enn manglandi heimild.

### Forðingin er politisk - ikki løgfrøðislig

Føroya Løgting hevur staðfest, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti sambært altjóða rætti. Føroyingar uppfylla eisini í dag allar treytir fyri at verða viðurkendar sum tjóð við sjálvsavgerðarrætti, og er tað tí ikki ein spurningur hvørt føroyskir myndugleikar hava rætt at umboða Føroyar í altjóða høpi. Hinvegin er tað bert ein spurningur um føroyskir myndugleikar krevja hetta og um danskir myndugleikar vilja loyva ella forða hesum - við eitt nú at vísa til heimastýrislógina frá 1948. Heimastýrislógin er tó ongin forðing fyri sjálvstøðugari føroyskari umboðan í altjóða høpi. Einasta forðingin er tann politiska.

### Skulu krevja tjóðarrættindi

Heldur enn at gera nýggja løgfrøðiliga binding millum Føroyar og Danmark, ið kann hava við sær, at føroyingar óbeinleiðis viðurkenna danska eindarstatin, viðurkenna avmarkaði rættindi til at umboða okkum sjálv og seta tjóðarrættindi í váða, átti Landsstýrið at farið veruliga til verka. Fingið altjóða staðfest og viðurkent tjóðarrættindi føroyinga - og kravt sjálvstøðuga umboðan, ábyrgd og avgerðarrætt í uttanríkis- og trygdarmálum.

Hetta eru rættindi vit eiga - men enn ikki hava kravt.



# HEILSANIR




**Góðu Bjarni og Bjørk**
Omman og abbin í Skálavík ynskja tykkum hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 10. og 27. okt.



**Góða Elisabeth**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 26. okt. Jesus pápi signi framtíð tína. Vit elska teg.
**Bestu heilsanir omman og abbin**



**Góða Barbara**
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum í dag.
**Heilsan mamma og babba**



**Hey Sonja**
Hjartaliga tillukku við degnum, vit gleða okkum at síggja teg aftur.
**Heilsan Gumma og Rúni**



**Góða Elisabeth**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag. Jesus pápi vælsigni framtíð tína. Vit elska teg.
**Heilsan gumman, mamba, Manja og Sára**



**Hey hon sjálv**
Nú byrjar aldurin at tyngja, men tú ber hann bara væl. Hjartaliga tillukku við degnum, sum var mánadagin. Tær bestu heilsanir frá
**Starvsfelagnum**



**Góða Barbara stórasystir**
Tillukku við føðingardegnum í dag. Takk fyri at tú ert so góð við meg.
**Heilsan Rakul**



**Tillukku Sonja**
Hjartaliga tillukku við degnum.
**Heilsan mamma og babba**



**Stórasysti**
Tillukku við fýra ára degnum. Vónandi fáa vit nógv bomm á føðingardegnum.
**Heilsan John**



**Góði Ólavur**
Hjartaliga tillukku við 15 ára degnum tann 25. okt.
**Ynskja mamma og Erla**



**Góði Magnar**
Hjartaliga til lukku við 22 ára degnum. Harrin signi framtíð tína.
**Ynskja omma og abbi á Vágsheygnum**



**Hey Sonja**
Til okkara stóru gentu. Tillukku við degnum 27. okt.
**Heilsan Sonjaomma og Haraldabbi**



**Tillukku Sonja**
Vit vilja ynskja tær tillukku við fýra ára degnum. Vónandi fært tú ein stuttligan dag.
**Omma og abbi á Glyvrum**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ...................................................................
Bústaður: ..............................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«